**BRÚKARATORGIÐ**

*Lang til rættis: Rigmor Dam*
*Kelda: Danska brúkarastýrið*

# Tá barnið skal út at sova

**Tað er bert í norðurlondum, at børn verða løgd út at sova. Ráðini eru, at barnið skal ikki leggjast út at sova, um hitin er lægri enn 10 kuldastig**

*Mátini innan: Um barnið skal kunna brúka vognin til tað er 2 ára gamalt, skal kassin helst vera 85-90 cm til longdar, í minsta lagi 32 cm breiður og 20 cm djúpur.*

*Trygdarmekanisman skal vera á tveimum stigum og í tveimum pørtum. Annars skulu tað vera tvær sameindar rørslur til at loysa hana.*

*Barnið eigur at vera fest í sela, tá tað er 5-6 mánaðar gamalt og dugur at sita sjálvt.*




*Á einum kombivogni skal kalessjan vera fest til botnin, so barnið ikki kann kroysta seg úr vogninum.*

*Frástøðan millum stýrið og kassan skal vera í minsta lagi 22,3 cm.*

*Bremsurnar skulu gerast virknar frá førarasíðuni. Tær skulu vera somikið góðar, at vognurin stendur væl í brekku.*

*Selaringarnir skulu vera festir millum 24,5 cm úr høvdalagnum til miðuna á kassanum.*

# Barnavogn, duo- ella kombivogn

**Vanliga tosa vit um trý ymisk sløg av barnavognum: Tann klassiski barnavognurin, duovognurin og kombivognurin**

**Klassiski vognurin** er ein kassi og stell, og ofta fylgir ein lift eisini við.

Um tit ynskja at brúka vognin til song, er tann klassiski vognurin bestur. Hetta er eisini galdandi, um tit ætla at brúka vognin til døgurðablundin, tá barnið verður størri. Plássið er gott og barnið liggur væl. Harumframt er vognurin væl bjálvaður móti kulda og vindi.

Ein **duovognur** hevur eitt stell, har tit annaðhvørt kunnu seta ein kassa á, ella eitt setur til klappvogn. Kassin er ofta bæði styttri og smalri enn í tí klassiska vogninum. Nógv halda, at vognurin ov skjótt verður ov lítil, til at barnið kann sova í honum.

Liggilongdin á einum klappvogni eigur at vera longri enn 90 cm hjá einum 2 ára gomlum barni. Setrið skal vera 30 cm breitt, so barnið eisini fær gagn av fóthaldaranum. Ofta er frástøðan styttri og ger hetta, at barnið situr samankropið.

Ein **kombivognur** er ein klappvognur, har ein lift kan setast í. Eins og við duovogninum, er plássið í liftini avmarkað, so barnið veksur skjótt úr henni. Klappvognurin skal hava somu minstamát fyri liggilongd, breidd á setrinum og frástøðan til fóthaldaran, sum greitt varð frá um duovognar.

## FAKTA

**Soleiðis kannar tú trygdina á barnavogninum**

Barnavognar skulu lúka nógv trygdarkrøv. Hesin kanningarlistin er góður at hava við, tá tit skulu keypa nýggjan vogn.

- Fráðstøðan millum stýrið og kassan skal í minsta lagi vera 22,3 cm.
- Fyri at loysa kassan frá stellinum, skulu tit loysa á tveimum støðum, ella trýsta í minsta lagi fimm kilo.
- Tá tit leggja stellið saman, skulu tit aktivera tvey ymisk stig, sum ikki eru knýtt at hvørjum øðrum.
- Bremsurnar skulu gerast virknar frá førarasíðuni. Tær skulu vera somikið góðar, at vognurin stendur væl í eini brekku. Stuðulsboyli gevur eyka trygd.
- Keypið ein vogn, sum er góðkendur av Dans Varefakta Nævn (DVN).
- Eingir smálutir ella skrúvur, sum barnið kann seta í hálsin, mugu vera.
- Barnið skal ikki kunna klemma fingrarnar nakrastaðni á vogninum.
- Selaringar skulu vera í vogninum. Teir skulu vera festir væl, einastaðni millum 40-46 cm frá høvdalagnum. So hóska teir til selar, sum eru góðkendir av DVN. Barnið skal liggja í sela, tá tað er um 5-6 mánaðar gamalt.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

## Brot úr skeiðskrá á KVASIR

**Teldukoyrikort og teldukoyrikort BASIS**
**Teldukoyrikorti er fyri øll, ið vilja læra munadygga teldunýtslu - uttan mun til aldur ella yrki. Teldukoyrikorti er uppbygt av sjey skeiðum.**
**Sum nakað nýtt bjóða vit eisini Teldukoyrikort BASIS. Hetta er eitt prógv, ið næmingurin kann fáa eftir at hava staðið royndirnar, ið hoyra til 4 av skeiðunum, ið eru í tí vanliga teldukoyrikortinum.**
**Um tú ynskir at fáa tær annað av hesum prógvunum, viðmæla vit, at tú byrjar við skeiðnum "Teldan og fíluskipanin", ið byrjar 1. mai.**



**1. mai 2006**
Teldan og fíluskipanin
3 x kl. 13:30-16:30: 01/05 + 08/05 + 15/05

**29. mai 2006**
Grundskeið í samskiftisneti v/IE og Outlook Express
4 x kl. 13:30-16:30: 29/05 + 05/06 + 12/06

**26. juni 2006**
Grundskeið í KT-teori
3 x kl. 13:30-16:30: 26/06 + 03/07 + 10/07



**Telduroð til nýbyrjarar**
LÆR AT NÝTA-skeiðrøðin er ætlað øllum ný-byrjarum. Skeiðini eru smíðað við denti á tað ítøkiliga heldur enn tað teoretiska og nógv verður gjørt burturúr at øll "eru við". Eingin krøv til forkunnleika eru - vit byrja frá grundini.

**29. mars 2006**
Lær at nýta rokniark
3 x kl. 09:00-12:00: 29/03 + 05/04 + 19/04

**26. apríl 2006**
Lær at nýta internet
3 x kl. 09:00-12:00: 26/04 + 03/05 + 10/05

**17. mai 2006**
Lær at nýta teldu
3 x kl. 09:00-12:00: 17/05 + 18/05 + 19/05

*Broytingar og fleiri skeið kunnu koma á skránna.*

**Um tú vilt hava at vita, hvørji onnur skeið vit bjóða, ert tú vælkomin at hyggja inn á heimasíðu okkara á www.kvasir.fo ella at ringja til okkum á tlf 320 204. Eisini ber til at senda okkum ein teldupost á kvasir@farodane.fo.**

**Í planlegging okkara er lagt uppfyri, at vit kunnu halda skeið eftir ynski frá bólkum, virkjum ella stovnum. Øll skeiðini tú finnur í skrá okkara kunnu bíleggjast á henda hátt. Ring til okkum, um tú ella virkið/fyritøkan hava serligan skeiðtørv. Vit veita fegin tilboð.**

**KVASIR nøktar tín skeiðtørv innan telduskeið, grafisk skeið og menning.**

Tel **320 204**
**www.kvasir.fo**